ítróttur

Nr. 222 • fríggjadagur • 16. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



# Golfvøllur til 18 hol




*Myndin sýnir, hvar nýggi golfvøllurin verður gjørdur. Ytri Ringvegur verður lagdur í in boga suður um vøllin, soleiðis at hesin skilur bygdu økini frá golfvøllinum*

**Tórshavnar Golffelag er komið væl áleiðis í ætlanunum um at gera ein 18-hola stóran golfvøll í Hoyvíkshaganum. Økið fer at fevna um 550.000 fermetrar, og innan leingi verður farið í holt við fyrstu byggistigini**

GOLF
*Jákup Mørk*

Fyrireikingarnar til gerð av einum golfvølli í fullari stødd eru nú komnar sera væl áleiðis, og tað er ikki hissini øki, sum nýggi golfvøllurin skal fevna um. Í alt er talan um 550.000 fermetrar, sum fevna um økið millum »Inni á Gøtu« og »Millum Gilja. Hetta svarar á leið til 55 fótbóltsvøllir, sum verða lagdir saman. Í løtuni verður golf annars spælt uppi á Vatnaskørðum, men tað eru bert seks hol í hesum vølli, og tá tað harafturat ikki hevur verið gjørligt at spælt um summarið, hava golfleikarar leingi havt eitt ynski um ein rættiligan golfvøll, har spælast kann alt árið.

Okkurt hevur av og á verið tosað um hetta, men nú er so líkt til, at talan verður um nakað væl meira enn tos.

## Teknað í Íslandi

Á tekningini oman fyri sæst, hvar nýggi golfvøllurin ætlandi skal liggja, og tað skal leggjast afturat, at talan ikki bert er um nakrar luftkastellir, sum eru feldar niður á pappír. Vøllurin er projekteraður niður í minstu smálutir, og er tað altjóða viðurkendi íslendski golf-arkitekturin, Hannes Þorsteinsson, sum hevur staðið fyri hesum partinum av arbeiðinum.

At tað júst er ein íslendingur, sum hevur teknað vøllin, kemur valla óvart á tey, sum hava nakað við golf at gera. Í Íslandi eru ikki færri enn 55 slíkir vøllir, og hópur av ferðafólki hevur golf sum høvuðsendamál, tá tey leggja leiðina fram við grannum okkara.

## Býráðið hevur játtað

Harald Eirikstoft í Havn er formaður í Tórshavnar Golfklubba, og hann váttar eisini, at felagið er komið rættiliga langt í fyrireikingararbeiðinum.

- Ein 49 ár leigusáttmáli er gjørdur við Jarðarráðið um leigu av økinum. Býráðsins partur av fíggingini er komin í rættlag, meðan tað enn ikki er gjørligt at fáa eina eina endaliga játtan frá landinum hesum viðvíkjandi.

Tá ætlanin av fyrstan tíð varð projekterað í 1995, varð samlaði byggiskostnaðurin mettur at liggja um 11 milliónir krónur, og tað eru so 30% av hesum, sum Býráðið hevur játtað at stuðla við. Hetta er sami stuðul, sum vanliga verður veittur ítróttarfeløgum.

Leggjast kann í hesum sambandi afturat, at Býráðið í hesum hevur treytað sær, at gongugøtur verða kring og ímillum vøllirnar, soleiðis at talan eisini verður um eitt rekrativt øki.

Eisini hevur jarðarráðið treytað sær, at festarin av jørðini, sum í løtuni er Sigert Patursson, bóndi, framhaldandi kann nýta økið til seyðabeiti, tó at avmarkingar sjálvsagt eru, har tey 18 holini eru.

## Hætta sær ígongd

Umframt tey 30%, sum Býráðið hevur játtað, er so ætlanin, at landið skal stuðla við øðrum 30%, meðan felagið sjálvt skal syrgja fyri írestandi 40%.

- Enn hava vit ikki fingið hetta heilt upp á pláss, men vit tó komin somikið væl ávegis, at vit hætta okkum at fara undir verkætlanina, og tað verður helst ikki so leingi, fyrr enn fyrsta stigið í hesum verður tikið, sigur Harald Eirikstoft.

Hann leggur tó dent á, at hetta við at gera ein golfvøll ikki er nakað løtuverk. At byrja við verður farið undir at gera vegarbeiðið, kloakkir og dren, og soleiðis er ætlanin at farast skal fram í smáum stigum. Eitt nú skulu ganga í minsta lagi tvey ár, frá tí at grasið á vøllinum verður sátt, til lendið kann nýtast at spæla á, so hóast farið verður í gongd innan stutta tíð, so fara nøkur ár at ganga, fyrr enn dreymurin um ein golfvøll verður veruleiki. Ein golfvøll, har Par verður 71.

## Mugu økja limatalið

Eitt er at fíggja byggingina av einum slíkum vølli. Nakað annað er alt tað viðlíkahald, sum eisini fylgir við, og Harald Eirikstoft ásannar eisini, at í løtuni er felagið ikki nóg stórt til hetta arbeiði.

Maskinur til at sláa gras við, drena og annað skulu sjálvandi fást til vega og haldast við líka, eins og tað sjálvandi eisini verður neyðugt við fólki til hetta arbeiði.

- Alt hetta fer sjálvandi at kosta nakað av pengum, og sum er megnar felagið ikki at bera hetta. Vit eru í løtuni 100 limir, og fyri at ætlanin skal mala runt, er neyðugt, at vit til ta tíð eru okkurt um 300 limir, sigur formaðurin.

Hann sigur tað ikki sjálvur, men tað er lítið at ivast í, at verður ætlanin veruleiki, so er grundarlagið fyri einum øktum limatali verður væl betri. Tað man í øllum førum vera munandi meira lokkandi at spæla golf, um umstøðurnar verða eitt 550.000 fermetra stórt øki í vøkrum lendi við 18 holum, sum øll lúka tey krøv, sum verða sett til altjóða kappingar. Og tá er ikki somikið sum nevnt, at golf-ítróttin er sera væl umtókt millum teirra, sum starvast í oljuvinnuni, men í hvønn mun hendan kemur til Føroya er so ein heilt onnur søga.

Prekvalifisering
**El-arbeiði í Vágatunnlinum**

Áhugaðir arbeiðstakarar verða við hesum bodnir at vísa áhuga at vera við í avmarkaðari útbjóðing av el-arbeiði í Vágatunnlinum.

Prekvalifikatiónstilfarið fæst við at venda sær til skrivstovu okkara á adressuni niðanfyri, ella við at senda teldupost til drh@vagatunnilin.fo

Freistin at lata inn umbidnu upplýsingarnar er 6. december 2001.

VÁGATUNNILIN
Vágatunnilin p/f · Skansavegur 7 · Postboks 1010
110 Tórshavn · Telefon 350200 · Telefax 350201

**Lýsing**
um
**Brævatkvøður til fólkatingsvalið 20. november 2001**

Veljarar í Runavíkar kommunu, ið sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni til 17. november 2001.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 417000 í avgreiðslutíðini í seinasta lagi 17. november 2001.

Býráðsskrivstovan er opin til avgreiðslu av brævatkvøðum **leygardagin 17. november frá kl. 16.00 til 19.00.**

**Runavíkar býráð**

**Keyp av seyðaskinnum**

Seinasta freist at lata seyðaskinn til okkum í ár er **1. desember.**

**Búnaðardepilin**
**FO-410 Kollafjørður**

**Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,**
**sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 253497 leygardag millum kl. 11 og 14**
**Prentmiðstøðin**

Starv

**SKRIVSTOVUFÓLK**

Hervið verður søkt eftir fólki til roknskapardeildina/lønarfyrisiting á Strandfaraskipum Landsins til setan frá 1. januar 2002.

**Uppgávurnar hjá Roknskapardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá Roknskapardeildini er at veita leiðsluni í fyritøkuni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina hjá fyritøkuni. Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Fyriskipan av roknskaparverkinum
- Uppsetan av fíggjarætlanum
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Lønarfyrisiting
- Innkeyps- og goymslustýring

**Starvið fevnir um**
Tann sum settur verður fær sum høvuðsuppgávu at tryggja eina effektiva umsiting av lønarútreiðslunum á SL. Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Skrásetan og avstemman av tímaseðlum o.l.
- Viðlíkahald av starvsfólkadátabasu
- Umsiting av sáttmálum við fakfeløg
- Samstarv og samskifti við:
  - starvsfólk og deildarleiðarar á fyritøkuni
  - fakfeløgini
  - Fíggjarmálastýrið/lønardeildina
- Útgjalding av lønum o.a.
- Tryggja at lønarútreiðslurnar verða rætt skrásettar á endamál og stað
- Uppsetan av lønarhagtølum

Annar týðandi partur av starvinum verður at samstarva við starvsfólkadeildina um at loysa felags uppgávur.

**Førleikakrøv**
- Skrivstovuútbúgving e.l.
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Kunnleiki og royndir í Navision fíggjarstýringsskipanini
- Kunnleiki og royndir í Microsoft Office forritunum
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Arbeiðsstaðið er Høvuðsskrivstovan í Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 30. november 2001.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Helga Nielsen, roknskaparleiðara, á tlf. 343000 ella e-mail hen@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

P/F Restorffs SISU

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg